# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Túsund tikin av døgum

Í gjár varð ein maður tikin av døgum í Ohio, og við hesum eru eitt túsund fólk avrættað í USA, síðan amerikanski hægstirættur tók upp aftur deyðarevsingina í USA í 1976. Um allan heim hava fólk mótmælt, og svenski ES formanskapurin hevur sent út eina fráboðan, har avrættingin verður fordømd. Deyðarevsing er ein barbarisk og ræðulig revsing, sum ikki hóskar í einum framkomnum samfelag. Deyðarevsingn er endalig og kann tí ikki bøtast, um tað, sum ofta hendir, seinni vísir seg, at tann, ið varð tikin av døgum var ósekur. Síðani DNA varð tikið í nýtslu sum próvtilfar í rættarmálum hava eftirkanningar av framdum deyðadómum í USA prógvað, at ein hópur av ósekum fólkum eru tikin av døgum seinastu trýati árini.

Við at nýta deyðarevsing fyri vanlig brotsverk er USA í bólki við londum, sum USA annars vanliga ikki vil setast í bás við. Hesi lond eru Iran, Kina, Saudi Arabia, Iraq, Sýria, Libya og onnur lond, har mannarættindini hava trong kor. Tað er eins løgið, og tað er syndarligt, at deyðarevsing skal vera ein so vanlig revsing í einum fólkaræðiligum samfelag sum USA. Hetta land metir seg vanliga at vera millum heimsins fremstu lond, tá um mannarættindi ræður. Deyðarevsing er brot á grundleggjandi mannarættindi og hartil kemur, at tað ofta er prógvað, at hendan ræðuliga revsing einki minkar um kriminalitet í samfelagnum.

Deyðarevsingin í USA er ein partur av amerikanskari mentan og eitt úrslit av tí sermerktu søgu, sum hevur skapað hetta land. Hetta er ein søga um harðskap, valdsnýtslu og um eina eyga fyri eyga og tonn fyri tonn siðvenju, sum er slept í kristna heiminum. Tað kundi tó nú sæð út til, at hesin gamaltestamentligi hugsunarháttur er um at missa sínar fastatøkur á amerikansku revsingarskipanni, tí avrættingarnar eru nógv minkaðar í tali seinastu árini. Men nú hevur kanning víst, at einki er broytt við hugsunarháttinum, serstakliga í suðurstatunum, har deyðarevsing annars er vanlig og hevur undirtøku millum manna. Orsøkin er nevniliga hon, at tað kostar nógv meira at døma ein ákærdan til deyða og at taka viðkomandi av døgum enn at lata viðkomandi sleppa við eitt nú lívslongum fongsli.

Uttan mun til hvørjar orsakirnar nú einaferð eru, so kann ein bert fegnast um, at avrættingarnar í USA minka í tali. Hetta er hóast alt eitt jaligt tekin, og heldur hetta rák fram, er vón um, at USA, ið metir seg sum undangongutjóð innan alt, sum eitur mannarættindi, heilt fer at sleppa hesi ræðuligu og ómenniskjansligu revsing, sum setir USA í sama bólk sum lond, ið eru kend fyri at knúska alt, sum eitur mannarættindi og fólkaræði. Henda barbariska revsing hoyrir ikki heima í nútímans fólkaræði, og tí er kanska ein vón um, at tjóðin, ið megnaði at velja ein Obama til forseta eisini megnar at broyta seg til eina tjóð, ið veruliga virðir vanlig mannarættindi. Hinvegin hevur heimurin rætt til at vænta, at Obama, sum stendur sum ein av heimsins mest humanu demokratisku leiðarum, fer at gera sítt til, at land hansara heilt leggur av at taka lív við rættarskipanini.

**Sosialurin**

## Fíggjarmálaráðið misnýtt til partapolitiska spinning?

HØGNI HOYDAL



**Fíggjarmálaráðið hevur sent tøl út til almenningin í kjalarvørrinum á málinum um meirnýtslu hjá Hans Paula Strøm. Hesi tøl hava síðani í fjølmiðlum verið nýtt til at leggja onnur landsstýrisfólk undir óheimilaða meirnýtslu. Men tølini eru skeiv, og siga onki um óheimilaða nýtslu**

Bæði á heimasíðu Norðlýsisins, í Sosialinum og partvíst í øðrum miðlum, hava søgur verið skrivaðar, og nøvn og andlit sett á landsstýrisfólk, sum skulu hava havt óheimilaðar meirnýtslur síðani 1997. Serliga Sosialurin, sum onki hevur skrivað um meirnýtsluna á Almanna- og heilsuøkinum, fer so langt sum at seta nøvn og andlit á meirnýtslur hjá landsstýrisfólki aftur til 1997. Og síðani skrivar blaðið um "dóm uttan grundarlag" hjá Hans Paula Strøm, hóast blaðið sjálvt fellur dóm á onnur utttan nakað grundarlag.

Grundarlagið fyri hesum søgum í fjølmiðlunum er eftir øllum at døma nøkur tøl, sum Jóannes Eidesgaard hevur umbiðið og sent út.

Haldi, tað er fínt, at alt málið við meirnýtslu verður tikið til viðgerðar. Og tølini vísa jú eisini, hvussu meirnýtslan tók dik á seg frá 2003 og frameftir.

Men tað er rættiliga grovt, at landsstýrismaðurin sendir skeiv tøl út í navninum hjá Fíggjarmálaráðnum, og tekur alt hetta mál burturúr samanhangi – sjálvsagt fyri at "kollektivisera" málið við Hans Paula Strøm, sum er eitt mál, ið er reist, kannað og avgreitt av teimum óheftu instansum í skipanini, sum sjálvsagt mugu nýtast, tá staðfestast skal, hvat er rangt og rætt.

Eg skilji tí ikki, hvussu fjølmiðlar kunnu bera hesar skeivu upplýsingar víðari frá Fíggjarmálaráðharranum, uttan at kanna og staðfesta um tølini og uppáhaldini eru røtt.

Sjálvur eri eg tildømis hongdur út fyri óheimilaða meirnýtslu sum landsstýrismaður frá 1998-2003, hóast eg hesi árini hevði eina minninýtslu og enntá fekk rós frá Landsgrannskoðanini fyri fíggjar- og roknskaparviðurskifti.

Vísi tí á hesar grundleggjandi skeivleikar, ið teimum tíðindum, ið eru borin út og skiftandi landsstýrisfólk eru løgd undir. Og eg gangi út frá, at Norðlýsið og Sosialurin fara at rætta og umbera mistøkini – og fara at kann, hvussu Fíggjarmálaráðið er misnýtt í hesum málinum.

1. Landsstýrisfólk, sum sótu í CHE-samgonguni, eru løgd undir at at hava havt meirnýtslu í 2008. Tað er beinleiðis skeivt og gjørt av órøttum. Hesi landsstýrisfólk sótu frá februar til september 2008. Og tey kunnu onga ábyrgd hava, at kassin ikki stemmar, tá árið er úti pr. 31. desember. Har eru jú 4 mánaðir til at halda játtanina og tað er serliga í seinastu mánaðunum, at meirnýtsla kann koma fyri.

2. Nýtsla av peningi, snýr seg um at halda grundleggjandi, lógir, reglur og landsstýrismannaábyrgd. Og tað er sera stórur munur á tølunum, sum Fíggjarmálaráðið sendir út og so staðfestingina av, um nakað skeivt er farið fram og um landsstýrisfólk eru farin út um sínar heimildir og ábyrgd.
   - Tildømis er meirnýtsla á lógarbundnum útreiðslum als ikki óheimilað, soleiðis sum meirnýtsla á vanligum rakstrakonti.
   - Hartil eru játtanarreglurnar fyri lógarbundnum útreiðslum broyttar avgerandi í tíðarskeiðnum frá 1997 og frameftir.
   - Umframt eru í ymsu ráðunum kontur, har møguleiki er at flyta ímillum, soleiðis, at tølini fráa FMR siga onki um, hvørt óheimilað nýtsla er farin fram.

3. Tí eru tey einastu tølini og autoritetirnir, ið kunnu nýtast í slíkum málum, tey frá Landsgrannskoðanini og síðani frá Løgtingsgrannskoðarunum. Hesir stovnar meta um og gera niðurstøður um, hvørt nakað skeivt er farið fram, og um ein meirnýtsla er heimilað ella ikki. Og tey tølini og niðurstøðurnar finnast øll í grannskoðaðu roknskapunum fyri hvørt árið.

4. Til tess at vísa á, at tit eru farin við skeivum tølum og upplýsingum, skal eg eitt nú vísa til grannskoðaðu roknskapirnar fyri tey mál, ið eg sjálvur havi umsitið frá 1998-2002. Har er ikki talan um nakra samlaða meirnýtslu, men tvørturímóti talan um eina samlaða minninýtslu uppá nakrar milliónir. Í 1999, har nakrar útreiðslur fóru eitt lítið sindur útum (ið ikki var ólógligt), varð tað rættað og kom ikki fyri aftur.

Øll kunnu kanna grannskoðaðu tølini og frágreiðingarnar á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, sum finnast her: http://www.lg.fo/index.php?module=menu&menu id=4&language=fo

Fari at siga frá, at tá Løgtingið kenur saman aftur, fer landsstýrismaðurin sjálvsagt at verða kravdur eftir eini frágreiðing um, hvussu skeiv tøl kunnu verða send út frá Fíggjarmálaráðnum til tess at bera í bøtuflaka fyri mál, sum eru lýst, kannað og staðfest av eftirlitsstovnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.